Almanna- og Heilsumálaráðið

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

# Sóknast verður eftir verkætlanarleiðara og verksetarum til eina av Føroya størstu og mest avbjóðandi almennu kt-verkætlanum

**Almanna- og heilsumálaráðið og Landssjúkrahúsið leita eftir fólki til uppgávuna at seta í verk og menna talgildu heilsuskipanina, stytt THS, til alt tað føroyska heilsuverkið. Talan er um eitt starv sum verkætlanarleiðari og 4 størv sum verksetarar av THS-verkætlanini.**

## THS-verkætlanarleiðari

Verkætlanarleiðarin avloysir núverandi verkætlanarleiðara, sum hevur valt at røkja aðrar uppgávur innan verkætlanina. Verkætlanarleiðarin kemur at hava prosjekt-leiðsluna fyri einum toymi, ið telur 5 starvsfólk, sum øll arbeiða við verksetan og menning av skipanini. Talan er um tíðaravmarkað starv í 2 ár, við møguleika fyri leingjan.

**Uppgávurnar hjá verkætlanarleiðaranum eru í høvuðsheitum hesar:**
- samskipa innkoyringina av THS í heilsuverkinum
- samskipa undirvísing í nýtslu og umsiting av skipanini
- standa fyri kunning um gongdina í verkætlanini – bæði innanhýsis í verkætlanini og mótvegis uttanhýsis áhugabólkum
- samskifta við veitarar
- menna og viðlíkahalda skjalatilfar
- samskifta við KT-skivuna – sum er THS-supporteindin
- samskipa uppstigingar og rættingar til skipanina
- leiða og stýra nýggjar verkætlanir undir THS-verkætlanini, t.d. markamót til apoteksskipan og aðrar skipanir
- samskipa tillagingar av skipanini
- tillaga skipanina

Haraftrat er møguleiki fyri, at viðkomandi í framtíðini eisini fær tillutað aðrar kt-uppgávur fyri ráðið, so sum at luttaka í øðrum kt-verkætlanum, t.d. innan kt-trygd og uppstiging av verandi skipanum.

**Vit leita eftir umsøkjara, sum:**
- hevur nøktandi kt-útbúgving og/ella royndir innan kt
- hevur útbúgving og/ella arbeiðsroyndir innan prosjektarbeiði – helst sum verkætlanarleiðari
- dugir væl at samstarva og motivera
- evnar at hava yvirlit, eisini í torgreiddum støðum
- dugir væl at arbeiða sjálvstøðugt
- er væl skipaður

**Vit kunnu bjóða tær:**
- eitt spennandi og mennandi starv í eini av størstu kt-verkætlanum, sum higartil er sett í verk í Føroyum
- eitt starv, har tú verður partur av einum dynamiskum toymi, har tú í stóran mun sjálv/ur sleppur at mynda tín leiklut í toyminum
- eitt spennandi og mennandi arbeiðspláss, har dentur verður lagdur á trivnað og skipaða førleikamenning
- førleikamennandi tiltøk í THS-skipanini innan verkætlanarleiðslu og á øðrum týðandi økjum hoyrandi til starvið

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag, umframt áramálsviðbót. Verkætlanarleiðarin fær í tí dagliga tilvísing til KT-leiðaran í Almanna- og heilsumálaráðnum.

Viðmerkjast skal, at setanin fevnir um Almanna- og heilsumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Nicolai M. Balle, KT-leiðara, á telefon 304050 ella á teldupostbústaðnum nicolai@ahr.fo

Umsóknir við avriti av viðkomandi prógvum og skjølum skulu sendast til:

**Almanna og heilsumálaráðið**
Eirargarður 2
100 Tórshavn.
Kt-deildin

og verða okkum í hendi í seinasta lagi 29. oktober 2007 kl. 12.00

## THS-verksetarar

Hevur tú heilsufrøðiliga bakgrund, dámar tær at undirvísa og læra fólk upp, so hevur tú nú møguleika at søkja starv sum THS-verksetari. Tú kemur at arbeiða í einum toymi, sum í løtuni arbeiðir við at seta í verk talgildu heilsuskipanina í føroyska heilsuverkið.

**Uppgávurnar hjá THS-toyminum eru í høvuðsheitum hesar:**
- skipa fyri og undirvísa brúkarum í THS
- savna saman og viðlíkahalda frálærutilfar
- vegleiða/upplæra brúkarum, so hvørt sum eindirnar taka THS í brúk
- lýsa arbeiðsgongdir
- luttaka á arbeiðsfundum og verða við til at savna saman upplýsingar, sum eru grundarlagið undir uppseting av THS
- undirvísa superbrúkarum í nýggjum funktiónum
- undirvísa í nýggjum tillagingum í THS-skipanini
- nároyna nýggjar tillagingar av THS-skipanini
- samskifta við KT-skivuna
- sparra og samstarva við lokalar umsitarar á eindunum
- eftir førimuni luttekur THS-versetari eisini í umsiting av skipanini

**Vit leita eftir umsøkjara sum:**
- hevur heilsufakliga bakgrund ella royndir innan heilsuverk
- hevur kunnleika og áhuga fyri kt og/ella royndir innan kt
- dugir at orða seg í skrift og talu
- er fyrikomandi og dugir við fólki
- arbeiðir sjálvstøðugt

**Vit kunnu bjóða tær:**
- eitt spennandi og mennandi starv í eini av størstu kt-verkætlanini, sum higartil er sett í verk í Føroyum
- eitt starv, sum tú í stóran mun sjálv/ur sleppur at mynda
- eitt spennandi og mennandi arbeiðspláss, har dentur verður lagdur á trivnað og skipaða førleikamenning
- skipað verður fyri undirvísing og førleikamennandi tiltøkum í THS-skipanini og á øðrum týðandi økjum hoyrandi til starvið.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Aftrat lønini verður goldin ein viðbót.

Starvið er tíðaravmarkað í 2 ár, at byrja 1. januar 2008, við møguleika fyri leingjan. Viðmerkjast skal, at setanin er undir Landssjúkrahúsinum við dagligum arbeiðsstaði í THS-toyminum á Almanna- og heilsumálaráðnum.

THS-verksetarar hava tilvísing til THS-verkætlanarleiðaran, sum í tí dagliga vísir til KT-leiðaran á Almanna- og Heilsumálaráðnum.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Ann Thomsen, kervisfyrisitara, á telefon 304050 ella á teldupostbústaðnum ann@ahr.fo ella til Hjørdis Zachariassen, THS-samskipari, á telefon 304500 ella á teldupostbústaðnum hjza@lsh.fo.

Umsóknir við avriti av viðkomandi prógvum og skjølum skulu sendast til:

**Landssjúkrahúsið**
J. C. Svabosgøta
Lønar- og starvsfólkadeildin
100 Tórshavn.

og verða okkum í hendi í seinasta lagi 29. oktober 2007 kl. 12.00

**Almanna- og heilsumálaráðið** · KT-Deildin
Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn

**Landssjúkrahúsið** · Lønar- og Starvsfólkadeildin
J. C. Svabosgøta • FO-100 Tórshavn